

# FISKIMÁLARÁÐIÐ ROYNIR EFTIR LØGFRØÐINGI

Fiskimálaráðið er í løtuni á eini leið við stórum avbjóðingum. Burtur úr rúgvuni kann nevnast arbeiðið at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, og arbeiðið at menna FAS-skipanina og evna til lóggávu á m.a. tilbúgvingarøkinum. Í hesum sambandi dyrgja vit í fyrsta umfari eftir einum løgfrøðingi, ið vil hava eitt avbjóðandi, áhugavert og sjálvstøðugt starv. Mynstrað verður skjótast tilber, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Tekur tú kjansin, fært tú eitt starv við fjølbroyttum uppgávum í mennandi, yrkisligum umhvørvi. Hevur tú áhuga og áræði at taka lut í og ávirka umfatandi menningina, er Fiskimálaráðið rætta miðið.

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur. Umsøkjari, ið hevur staðið útbúgving sum búskaparløgfrøðingur ella bachelor útbúgving í løgfrøði er tó eisini vælkomin at søkja. Tú skalt duga væl at samstarva og eisini tora at vera í sjálvdrátti. Á brúnni í Fiskimálaráðnum starvast í løtuni ein løgfrøðingur. Komandi løgfrøðingurin fer fyri ein stóran part at ganga vakt saman við honum.

**Høvuðsuppgávurnar í starvinum eru at:**

- veita landsstýrismanninum, deildum og stovnum undir ráðnum løgfrøðiliga ráðgeving
- fyrireika lógaruppskot og kunngerðir
- viðgera kærumál
- málsviðgerða lógarspurningar í fiski-, sjóvinnu- og tilbúgvingarmálum.

Starvið verður sett sum skjótast sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Fiskimálaráðið, stovnar undir Fiskimálaráðnum, Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum, lívsgongdarlýsing og øðrum kann sendast til:

**Fiskimálaráðið**
**Heykavegur 6**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **11. september 2006 klokkan 12.00**. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Marjun Magnussen, leiðandi løgfrøðing á telefon 35 30 30 ella umvegis teldupost til marjun@fisk.fo. Lýsingin sæst eisini inni á www.fisk.fo.

www.fisk.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU - VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI - VIT VILJA VITA - VIT BRÓTA SLÓÐ

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*


# ÚTSØLAN

byrjar mánamorgunin 28. august kl. 9.00

**Oratop vindjakkar**
Fleiri litir
áður ~~1998,-~~
nú bara 998,-



**Arbeiðscowboybuksur**
einar 298,-
Tak tvinnar bara 400,-



**Klæðningar**
áður ~~4898,-~~
nú bara 1998,-

**Meyer klæðningsbuksur**
í fleiri litum - ull/ terylene og stretch
áður ~~998,-~~
Nú einar 698,-
Tak tvinnar bara 1200,-



Gant buksur -50%
Gant jakkar -50%
Gant skjúrtur -50%
Gant troyggjur -50%
Fleiri flottir litir

**Klæðningsjakkar**
áður ~~1398,-~~
nú 800,-



**Flottar skjúrtur**
v/ stuttum og longum ermum
1 stk. bara 198,-
Tak tvær fyri bara
300,-

**Klæðningsjakkar frá Digel**
áður ~~1898,-~~
nú bara 998,-

**Roberto bummullsbuksur**
í svørtum og kaki
áður ~~598,-~~
Nú 1 par 398,-
Tak tvinnar fyri bara 600,-

**Lee cowboybuksur**
steinvaskaðar og svartar
Einar 598,-
Tak tvinnar fyri bara 800,-

**Arbeiðs-terylenebuksur**
- RESTIR -
Einar 598,-
Tak tvinnar fyri 900,-

TEAM85

Smyrilsvegur 7 · Tel 317210 · Fax 317806

Hans Joensen
Síðan 1889